# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg haldi, at vit eiga at seta meiri ferð á tað hernaðarliga samstarvið millum Russland og Sýrialand (Bashar al-Assad)*

## Tann 15. vanlukkan við MD-82



*Eldur kom í flogfari, sum brotnaði tvørturav*

*Mynd: Scanpix*

**Vanlukkan í Madrid í gjár var ikki tann fyrsta við MD82-flogførunum**

Koreanska flogfelagið Korean Air átti upprunaliga flogfarið, sum fór av breytini í Madrid seinnapartin í gjár. Tað varð bygt fyri 15 árum síðani og fór sína fyrstu ferð í novembur í 1993. Í 1999 yvirtók Spanair flogfarið. Hetta sama árið gavst amerikanska verksmiðjan McDonnell Douglas at gera hesi flogførini.

MD82-flogførini eru serliga ætlað til at flúgva stuttar og meðallangar ferðir, og tey eru rættiliga vanlig í Evropa. Tey fyrstu flogførini vórðu bygd í 1980, men tey, sum vórðu bygd aftan á 1993, vórðu broytt, so tey skuldu brenna minni og larma minni.

Í gjárkvø'ldið bleiv upplýst, at vanlukkuflogfarið hevði avlýst nakrar ferðir, tí tað hevði havt tekniskar trupulleikar. Hinvegin hevði flogfarið ikki verið fyri nakrari vanlukku fyrr. Harafturímóti vistu fjølmiðlarnir at siga, at vanlukkan í gjár var tann 15. við MD82-flogførunum, og tað er eisini komið fram, at so seint sum í apríl kravdu amerikonsku loftferðslumyndugleikarnir, at øll MD82-flogførini hjá amerikonskum feløgum skuldu trygdarkannast.

Amerikanska eftirlitið kom við einum líknandi kravi í 2006, og tá fleiri flogfeløg høvdu ilt við at gera eftir kravinum, fingu tey forboð fyri at brúka flogførini. Sambært tíðarritinum Ingeniøren boðaði SAS tá donsku loftferðslumyndugl eikunum frá, at talan var um ein amerikanskan trupulleika.

Tann seinasta álvarssama vanlukkan við einum MD82-flogfari var tann 16. septembur í fjør, tá eitt flogfar hjá felagnum One Two-Go Airlines fór á glið og út av breytini í Phuket í Teilandi. 89 av teimum 130, sum vóru í flogfarinum doyðu.

## Hevði tekniskar trupulleikar

**Spanair-flogfarið mátti útseta fráferðina orsakað av tekniskum trupulleikum**



*Spanair-flogfarið hevði trupulleikar undan seinastu ferðini*

*Mynd: Polfoto*

Leiðslan í Spanair vil ikki koma við nøkrum boði uppá, hví MD82-flogfarið fór av breytini í gjár, men spanskir fjølmiðlar hava gjørt nógv burturúr, at flogfarið hevði tekniskar trupulleikar undan seinastu fráferðini.

Blaðið El Mundo skrivar, at eftir ferðaætlanini skuldi flogfarið fara úr Madrid klokkan 13. Tað fór eisini út á breytina, men klokkan 13.42 kom tað aftur. Tá varð fráboðað, at fráferðin var útsett til klokkan 14.25. Klokkan 14.45 hendi vanlukkan.

Sambært sponsku fjølmiðlunum bleiv fráferðin útsett orsakað av tekniskum trupulleikum, og tað váttaði ein embætismaður hjá loftferðslustýrinum í Madrid í gjárkvøldið fyri blaðnum El Mundo.

Ein royndur flogskipari, sum Sky News hevur tosað við, sigur, at flogskiparin kann hava sæð, at eldur var í øðrum motorinum, men at hann kortini kann hava gjørt av at fara uppfrá og at lenda aftur beinanvegin. MD82-flogførini eru soleiðis nbygd, at tey kunnu fara á flog við einum motori, sigur Sky News.

### 153 doyðu

172 fólk vóru í flogfarinum, sum fórst í Madrid í gjør. 153 teirra doyðu, og hini 19 vórðu flutt á sjúkrahús. Sponsku myndugleikarnir siga, at 22 børn vóru í flogfarinum. Hóast flogfarið hevði samband við eitt Spanair-flogfar úr Kastrup, var eingin dani í vanlukkuflogfarinum. Tey flestu ferðafólkini vóru spaniumenn, men har vóru eisini tríggir sviar. fýra týskarar og ein breti. Svensku myndugleikarnir søgdu í gjárkvøldið, at ein svensk kvinna var sloppin frá vanlukkuni á lívi. Tá vistu myndugleikarnir ikki, hvussu vorðið var við hinum báðum.



### STUTT SAGT

### Russari tikin fyri njósning

Russiska trygdartænastan hevur tikið ein yvirmann í russiska herinum og skuldsett hann fyri at hava njósnast til frama fyri Georgia. Tað váttaði ein talsmaður hjá trygdartænastuni í gjár.

Sambært talsmanninum varð heryvirmaðurin tikin í landspartinum Stavropol, sum er rætt við georgiska markið, og var hann í ferð við at savna upplýsingar um russiska herin, tá hann bleiv tikin. Trygdartænastan sigur eisini, at heryvirmaðurin hevur latið georgisku myndugleikunum upplýsingar, sum georgiski stjórnarherurin fekk gagn av í stríðnum við russiska herin í Suðurossetia.



*Russiskur heryvirmaður hjálpti fíggindanum*

*Mynd: Polfoto*

### Hua deyður

Fyrrverandi kinesiski leiðarin Hua Guofeng er deyður, 87 ára gamal. Tað skrivar tann almenna tíðindastovan Xinhua. Hua Guofeng tók við formansstarvinum í kinesiska kommunistaflokkinum, tá Mao Zedong doyði 1976, men tvey ár seinni mátti hann víkja fyri Deng Xiaoping .

Stutt eftir at Hua hevði tikið við sum floksformaður, vórðu Jiang Qing, einkjan eftir Mao Zedong, og trý onnur tikin, og tað gjørdist endin á teirri sokallaðu mentanarkollveltingini í Kina. Tað er kortini ikki greitt, um Hua Guofeng átti nakran lut í handtøkunum.

Deng Xiaoping, sum tók við formansstarvinum eftir Hua Guofeng, sat sum forsætisráðharri til 1980 og floksformaður til 1981, og hann sat í leiðsluni í kommunistaflokkinum líka til 2002.



*Guofeng var kinesiskur floksformaður í tvey ár*

*Mynd: Polfoto*